


*Nr. 7* **28. mars 2021** *81. árg.*

# Tað er vón

Shervin Ebrahimian greiddi frá lívi sínum á Visjon Norge. Hann er irani, men flutti til Noregs sum 13 ára gamal við familju síni. Tað var kollveltandi fyri hann at koma til eina so øðrvísi mentan. Hann fekk ikki fóta sær og kom inn í eitt rúsevnisumhvørvi. Tað gjørdist verri og verri, og har helt hann til í 11 ár.

Hann fekk ein son, men hevði einki samband við hann. Shervin var muslimur, men bara av navni. Hann royndi buddismu og hinduismu og var í Nepal. Men einki av hesum gav honum nakað, og hann hugsaði, at hann var ein vánaligur pápi fyri son sín og ringur sonur fyri foreldur síni.

Hann hugsaði, at eingin vón var, og hann ætlaði at gera av við seg, men so kom eitt suff úr hjartanum: „Gud, ert tú til, so mást tú hjálpa mær!!!“ – So ringdi telefonin. Hann ætlaði sær ikki at taka hana, men gjørdi tað kortini. Tað var ein norskur vinmaður úr rúsevnisumhvørvinum. Hann segði: „**Hann, sum hevur skapað himmal og jørð, hann hevur tikið bústað í hjarta mínum. Eg eri vorðin frelstur**!“

Shervin segði: „Tú mást koma og vitja meg.“ – Norski vinmaðurin svaraði: „Eg eri á veg yvir til tín við einari Bíbliu.“

Hesin norski drongurin var eitt bønarbarn, og tveir mánaðir framman undan hesum var hann frelstur. Tá fór hann at biðja fyri Shervini, sínum iranska vinmanni. Í hesum tíðarskeiðinum fór hesin norðmaðurin til Seljord, har møtir vóru. Fleiri frelstir iranar vóru har. Norski vinmaðurin sigur so við tann eina: „Eg havi ein vinmann, sum er irani. Eg vildi ynskt, at hann bleiv frelstur sum tú.“

„Ja,“ svarar iranin, „far og keyp eina Bíbliu til hansara.“ So fór hann út í bilin hjá sær og kom aftur við 10–15 kassettubondum við talum og lovsongi á farsi. „Tú skalt ringja til vinmann tín og geva honum hetta.“

Tá ið Shervin spældi kassetturnar, var tað fyrstu ferð, hann hoyrdi lovsong á farsi. Hann merkti ein heilagan dám inni í stovuni. Hann fór á eitt Maranata-møti í Arendal saman við norska vinmanninum. Talarin talaði beint inn í lívið hjá Shervini, eins og talaði hann bara til hansara og ikki til tey 20–25 onnur, sum vóru á møtinum. Meðan hann sat har, fekk hann trúnna. Hann bleiv fyltur við Guds nærveru, hansara kraft og dýrd.

Hann misti heilt hugin til gamla lív sítt. Hann var í einum nú loystur frá øllum, eisini sigarettum. Nú eru tað 20 ár síðani. Tað, sum fyllir lívið nú, er møtigongd og bíbliulestur og tænastan fyri Harran.

Hann eggjar teimum, sum biðja fyri sínum, at vera áhaldandi, tí lyftini eru rimmarføst, og svarið kemur í sínum tíma.

*Effie Campbell.*

# Kristna lívið – eitt innvígað lív

*Shervin Ebrahimian*

Tað er týdningarmikið í hesi endatíðini, at vit trúgvandi liva eitt innvígað lív. Jesus sigur í Áps. 1,8: „Tit skulu fáa kraft, tá ið Heilagur Andi kemur yvir tykkum…“ Har ger Jesus greitt, at vit klára tað ikki í egnari kraft, men eru bundin av Heilaga Andanum. Hetta er ein tíð, har vit mugu leggja niður okkara egnu arbeiðsætlanir og innvíga okkum 100%. Fyrr legði eg sjálvur mínar ætlanir, men tað førdi bara til neyð og elendigheit. Nú geri eg einki, fyrr enn eg havi spurt Harran til ráðs. Í hesum sambandi hugsi eg um Samson.

Samson er ein mynd av at liva eitt innvígað lív. Samson var ein Nasireari. Hann var halgaður Harranum alt frá móðurlívi. Rakiknívur mátti ikki koma á høvur hansara. Hann líktist burturúr síni samtíð. Tað er tað, sum Harrin vil við okkum í dag. Vit skulu ikki líkjast verðini meir og meir, men søkja Harran og vera fylt av Heilaga Andanum. Vit skulu tora at líkjast burturúr. Vit skulu ikki skammast við evangeliið, tí at tað er Guds kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr.

Ein Nasireari skuldi heldur íkki drekka vín ella sterkar drykkir. Tað eru mong, sum lifra við sovorðnum. Vit skulu heldur lata okkum fylla av Guds Anda, tí verðin gevur bara tómleika. Vit skulu ikki hava eitt bein her og eitt har. Vit eru Guds fólk, og vit skulu reisast og ikki skammast við evangeliið.

Samson mátti heldur ikki nema við eitt deytt djór, sum er ein mynd upp á tað kjøtiliga, holdsliga. Kjøtið er jú deytt, tað gagnar einki. Tað er Andin, sum ger livandi.

Gjøgnum alla frásøgnina um Samson stendur í heilum, at Andi Harrans kom við kraft yvir hann, og tá fekk hann kreftir at gera yvirnatúrlig ting. Ein Nasireari er ein innvígaður maður, sum er fullkomiliga bundin at Harranum.

Í dag hava vit ikki bardaga móti holdi og blóði, men móti andaherliðum illskaparins í himnarúmdum. Jesus elskar menniskju. Hann vil, at tey skulu setast í frælsi. Harrin loysti meg fullkomiliga út úr islam, rúsevnum og øllum djevulskapi.

Samson bleiv forelskaður í Dalilu, sum er ein mynd upp á verðina. Hann lifrar við verðini. Dalila vildi handtaka og binda hann og oyðileggja lív hansara, og tað er tað, verðin vil gera við okkum. Tað er so álvarsamt. Harrin vil, at vit heilhugað skulu fylgja honum. Dalila klipti hárið av honum, tá veik Heilagi Andin frá honum, og skrivað stendur, at hann visti ikki ein gang av tí. Filistar stungu eyguni út úr honum. Vit blíva andaliga blind, tá ið vit lifra við verðini, og tá seta vit spurnartekn við Guds orð: „Er glatanin til? Er hetta nú synd, er hatta nú synd?“ Vit gerast blind og missa andaligu sjónina. Tað, sum Guds orð sigur var synd fyrr, er synd í dag, tí Gud sigur ikki eitt í dag og eitt annað í morgin.

*Effie Campbell.*

# Meinigheitin

„Men eg (Jesus) sigi tær eisini: Tú ert Pætur (tað merkir: ein klettur), og á hesum kletti vil eg grunda kirkju mína, og helheims portur skulu ikki fáa vald á henni.“ (Matt. 16,18). Jesus byggir meinigheitir. Hann vil byggja sína meinigheit upp á opinberingina av sær sjálvum. Jesus byggir sína meinigheit, og vit eru við í hesum byggiarbeiði. Hvør meinigheit er ein Guds ljósastaki úr gulli, sum skrivað stendur í Opb. 1,20.

*e.c.* ums.

# Hvat halda tit um Kristus?

*Robert Pierson*

Størsti spurningurin fyri einstaka menniskjað í dag er: „Hvat halda tit um Kristus?“ Matt. 22,42. Æviga lagna okkara er treytað av svari okkara til henda spurning.

Ein fríteinkjari lá fyri deyðanum. Fyri hann var deyðin bara eitt lop út í náttina. Tá ið svarta teppið var drigið fyri, var einki meir. So var liðugt. Uttan Jesus er eingin lívgevari og eingin undurfull uppreisn. Meðan hann lá og hugsaði um hetta á deyðslegu síni, má Guds Andi hava talað til hansara, tí eftir deyða hansara funnu tey eitt pappírsark við hesum orðum:

„Eg havi roynt at stríðast ímóti mínum ótta upp á túsund mátar, men til fánýtis. Bíblian sigur, at tað er bara ein einasti vegur: Jesus. Myrkur var í sál míni. Mítt hjarta var hart sum stál. Eg kundi hvørki síggja ella hoyra. Eg rópti eftir ljósi og lívi. Men tað var bara eitt at gera: at koma til Jesusar í einfaldari trúgv. Hann doyði, hann livir, hann situr við valdinum, hann gongur í forbøn fyri mær. Tað er kærleiki í øllum orðum hansara og gerningum. Einasta vónin hjá einum sekum syndara er at finna hjá Jesusi. Lat onnur bert háða og spotta. Eg vil fara til hansara við allari mínari skuld og skomm. Navnið yvir øllum nøvnum er Jesus.“

*Effie Campbell* umsetti.

---

Ein vitnisburður hevur stóra makt og kann avgera eina rættarsak. Eitt virðisbræv má hava undirskriftir frá vitnum. Tí viðmæli eg tær: Brúka tín vitnisburð.

*e.c.* ums.

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. mars | Tekstur: | Páskadagur, Matt. 28,1-15 | bíbliuorð: | Matt. 28,6a |
| 4. apríl | Tekstur: | 2. páskadagur, Luk. 24,13-35 | bíbliuorð: | Luk. 24,34b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 8** **11. apríl 2021** **81. árg.**

# Kvinnurnar við grøvina

*Luk. 24,1–12.*

*Alvhild Vassel Eide, Noreg*

Hendingin fer fram í lýsingini fyrsta dagin í vikuni ta páskahøgtíðina, tá ið Jesus varð krossfestur, doyði og varð jarðaður. Tá komu kvinnurnar til grøvina. Lukas nevnir tríggjar kvinnur, Mariu Magdalenu, Jóhonnu og Mariu, móðir Jákups. Men tá ið tær greiddu frá tí, tær høvdu sæð, vóru tær eisini saman við øðrum kvinnum. Kvinnurnar vóru hjástaddar, tá ið Jesus doyði: „Men allir kunningar hansara, og tær kvinnur, sum høvdu fylgt honum úr Galileu, stóðu langt burtur frá og hugdu at hesum.“ Luk. 23,49.

Kvinnurnar vóru hjástaddar, tá ið hann varð lagdur í grøvina: „Og tær kvinnurnar, sum vóru komnar við honum úr Galileu, fylgdu eftir, og tær sóu grøvina, og hvussu likam hansara varð lagt.“ Luk. 23,55.

Teir 12 lærusveinarnir vóru menn. Vit hoyra, hvussu Jesus kallar teir, meðan teir vóru til arbeiðis, og vit hoyra, hvussu teir fylgdu honum í góðum og ringum, hvussu teir vóru vitni til stórverk hansara, og hvussu teir av og á royndu at forða fyri vælgerningum hansara.

Vit hoyra ikki so nógv um kvinnurnar. Men her fáa vit at vita, at kvinnurnar høvdu eisini verið við úr Galileu. Tær vóru farnar frá øllum fyri at fylgja Jesusi, ið hvussu er fyri eina tíð. Tær høvdu gingið á teirra fótum úr Galileu, vóru komnar saman við honum til Jerusalems og vóru drignar upp í hendingarnar hesa syrgiligu páskahøgtíðina. Hann, sum tær høvdu sett sítt

álit á, varð spottaður, húðflongdur og áspýttur, og síðani varð hann krossfestur. Har doyði hann og varð jarðaður fyri eygum teirra.

Nógvar daprar og sorgfullar tankar munnu tær hava havt, tá ið tær fóru til grøvina í lýsingini fyrsta dag í vikuni. Jesus var deyður, og tær fóru at salva likam hansara, soleiðis sum siður var. Tær vildu vísa sítt takksemi móti Jesusi. Tær vildu sýna honum seinasta heiðurin. Tær vildu siga farvæl. Tær skiltu ógvuliga lítið, tá ið tær sóu, at grøvin var opin og tóm. Menn í skínandi klæðum søgdu frá menniskjasoninum, sum var risin upp og ikki longur var millum tey deyðu. Tað ótrúliga var veruleiki. Jesus var risin upp frá deyðum, sum hann hevði sagt. Tað bóru tær boð um, kvinnurnar, sum vóru komnar at salva vinin og lærumeistaran, Jesus. Tær høvdu verið vitni til nakað stórt, sum tær máttu siga víðari, „fyri teimum ellivu og fyri øllum hinum". Luk. 24,9.

Kvinnurnar við grøvina byrjaðu ta stafett, ta boðrenning, sum vit eru ein partur av. Tær boðaðu um tann livandi Frelsaran, um hann, sum hevði sprongt deyðans leinkjur, um hann, sum tí hevur givið okkum, sum trúgva á hann, somu vón um uppreisn. „Men nú er Kristus risin upp frá deyðum sum frumgróðurin av teimum, sum sovnað eru burtur." 1. Kor. 15,20.

Hetta er ein góður og glaður boðskapur fyri øll, sum í ótta stúra fyri deyðanum, fyri øll, sum ikki hóma nakra vón eftir deyðan, fyri øll, sum halda, at deyðin er endin. „Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann doyr; og hvør tann, sum livir og trýr á meg, skal aldri um ævir doyggja." Jóh. 11,25–26. Jesus sigur hesi orð um seg sjálvan. Kvinnurnar, ið komu til grøvina, vóru vitni um hann. Tær søgdu ápostlunum tað, tær høvdu sæð og hoyrt.

Vit hava eisini sæð og hoyrt. Hin krossfesta Jesus, hin upprisna Jesus hava vit sæð og hoyrt, av tí at onkur segði okkum um hann, av tí at onkur peikaði okkum á hann. Sum kvinnurnar við grøvina hava vit eisini fingið ta uppgávu at siga øðrum um hann. Tað kann bera á, at vit uppliva tað sama sum kvinnurnar við grøvina, tey vilja ikki trúgva okkum: „Tær søgdu ápostlunum frá hesum. Og teir hildu hesi tíðindi vera nakað møsn." Luk. 24,10–11. Men tað kann eisini bera á, at vit fáa

loyvi at uppliva, at onkur, á sama hátt sum Pætur, fer at kanna viðurskiftini. „Men Pætur fór tá á føtur og rann út til grøvina ... og undraðist á tað, sum var hent.“ Luk. 24,12.

Hava vit møtt tí upprisna Jesusi, so eru vit við í tí stafettini, sum ikki endar, fyrr enn Jesus kemur aftur, tí stafettini, sum greiðir frá í orðum og gerðum, at Jesus sigraði á deyðanum, og at hann livir í dag.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fríkendur í hægstarætti

*Moses Hansen*

Tá ið eg vitjaði son okkara í Borup í gjár, hitti eg nakrar av arbeiðsfeløgum hansara. Ein teirra segði frá einum tíðarskeiði í lívi sínum, har hann var fyri stórum royndum. Máliskan, hann brúkti, greip meg.

Hann íðkaði frælsan ítrótt og var í sera góðari venjing. Men ein morgunin vaknaði hann og var lammaður høgrumegin. Tað merkti, at høgri armur og høgra hond vóru næstan ónýtilig. Tá ið læknin hevði kannað hann, kom læknin við hesum dómi: „Tú verður noyddur at fyrireika teg til at liva sum lamin restina av lívinum!“

Í seinna parti av frásøgn síni brúkti hann eina málisku, sum eg serliga gav mær far um. Hann segði: „Eg skeyt dómin hjá læknanum inn fyri mín Gud og himmalska Faðir og bað hann ógilda dómin.“ Tað er jú tað, sum vit gera her í okkara dagliga lívi. Ein dómur fellur í rættinum. Heldur hin dømdi, at hetta er ein órættvísur dómur, skjýtir hann ella hon dómin inn fyri landsrættin – og síðani til hægstarætt, um tað verður neyðugt. Summi eru dømd í rættinum og landsrættinum – men fríkend í hægstarætti.

Hesin maður skeyt dómin hjá tí jarðiska læknanum inn fyri Yvirlæknan í Himli – til Rættin hjá tí Hægsta: Guds náðitrónu. Hann bað Gud ógilda dómin, og so fór hann undir at gera tað, læknin hevði sagt, at hann ikki mátti: at brúka armin og hondina ógvuliga nógv.

Eftir seks vikum var dómurin ógildaður. Tá ið hann so aftur skuldi til kanningar hjá læknanum og við høgru hond trýsti fast í hondina á læknanum, segði læknin: „Á, er tað vinstra hond, sum er lammað?“

Maðurin svaraði: „Nei, tað var høgra hond og høgri armur, men Gud hevur ógildað dómin!“ Eg kann vátta, at dómurin ER ógildaður. Tá ið hann tók í hondina á mær, helt eg, at hondin á mær fór í knas.

Tað er gott at vita, at vit hava ein Yvirlækna í Himli og ein rættvísan Hægstarættardómara á sama staði, sum til eina og hvørja tíð er førur fyri at ógilda teir dómar her á jørðini, sum Hann heldur tað vera rætt at ógilda. Gloym ongantíð at leggja tína søk fram fyri Hann.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hitt profetiska ljósið

Okkum tørvar hitt profetiska ljósið bæði í góðum tíðum og krepputíðum. Eru stórhendingar báðar vegir, toyggir mannasálin seg eftir hinum profetiska ljósinum, og tað er gott. Men sannleikin er, at okkum tørvar altíð at ganga í hesum ljósi.

Eftir Bíbliuni elva krepputíðir ikki til myrkrið, men tær styrkja um tað. Paulus talar um, at náttin er næstan liðin, og glæman brestur fyri degi. Pætur sigur, at vit standa á myrkum staði. Tí er alneyðugt, at vit hava í huga tryggu orð profetsins, alt meðan vit ganga pílagrímsferð okkara her á fold.

Lív okkara verður umbroytt, ganga vit í hinum profetiska ljósinum. Pætur, tá ið hann talar um ávísar hendingar í framtíðini, sigur: „Hvør eiga tit ikki tá at hava eina heilaga atferð og gudsótta“ (Pæt 3,11–12).

At seta alla vón okkara til Jesu Krist afturkomu til kirkjulið sítt verður lív okkara halgað. Øll tey, sum seta vón sína til hansara, reinsa seg sjálvan, eins og hann er reinur.

Latum okkum tí stíga fram í stórum í hinum profetiska ljósinum, sum okkum er givið.

*t hansen* umsetti.

---

Eg geri ikki tað illa til mítt undirhald. *e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 11. apríl | Tekstur: | Dóm. 6,1-3+11-16+25-31 | bíbliuorð: | Dóm. 6,16b ella 5 Mós. 31,8 |
| 18. apríl | Tekstur: | Dóm. 7,1-4+9-21 | bíbliuorð: | Jes. 41,10 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74